VIÐMERKINGAR

# Tilfeingisrentur í búskaparfrøði — ein rættleiðing

Johnny Jacobsen

Í tí alneyðuga orðaskiftinum um skipanina av okkara høvuðsvinnu er hugtakið 'tilfeingisrentur' eitt afturvendandi hugtak. Eitt nú verður hugtakið nevnt í grein hjá Bjarta Mohr í Sosialinum mikudagin 20. februar 2002, ið er eitt aftursvar til kronikk hjá Búskaparráðnum. Í greinini verður nevnt, at modellið við tilfeingisrentum er elligamalt og einans brúkt í Sovjetsamveldinum. Hetta er ikki rætt, tí modellið við tilfeingisrentum hevur einki við Sovjetsamveldið at gera.

**Hugtakið í búskaparfrøðini**

Tað var ein danskur búskaparfrøðingur, Jens Warming, sum í 1911 á fyrsta sinnið vísti á, at eitt náttúrligt tilfeingi sum fiskastovnarnir kunnu veita eina tilfeingisrentu til samfelagsbúskapin. Tó var tað ikki fyrr enn í 1950'unum, at búskaparfrøðiliga granskingin í altjóða høpi veruliga tók evnið upp til viðgerðar. Tá var tað búskaparfrøðingurin Anthony Scott, sum í eini grein uppstillaði ein myndul, ið lýsti samanhengin millum gongdina í fiskastovnunum og samfelagsbúskapinum. Síðani hevur búskaparfrøðin verið á einum máli um, at náttúrliga tilfeingi kann veita eina tilfeingisrentu. Men júst møguleikin fyri positivum tilfeingisrentum ger tað neyðugt hjá myndugleikunum og/ella vinnuni at gera eina felags skipan av gagnnýtsluni av fiskastovnunum. Tí annars vilja tilfeingisrenturnar verða 'burturfiskaðar' í eini kapprenning eftir tí virðismikla tilfeinginum.

Tilfeingisrentan er allýst sum meirvirðið, ið fiskatilfeingið hevur útyvir kostnaðin (bæði til arbeiðshendur og skip) fyri at fáa tilfeingið uppá land. Sostatt er tilfeingisrentan tengd at bæði verðinsmarknaðarprísinum fyri fisk, prísinum fyri innsatsin (hýra og skipaprísir) og støðuni hjá fiskastovnunum. Uttan eina felags skipan av gagnnýtsluni av fiskastovnunum — t.e. við opnari og kostnaðarleysari atgongd til fiskastovnarnar — vilja tað altíð koma nýggj skip til, so leingi tilfeingisrentan er positiv. Endin er, at fiskastovnarnir verða niðurfiskaðir, inntil veiðukostnaðurin fyri síðsta kg er á stødd við landingarvirði pr. kg — tilfeingisrentan er burturfiskað.

**Tilfeingisrentur í Føroyum**

Í Føroyum hava myndugleikarnir valt at skipa fiskivinnuna við eini fiskidagaskipan við langtíðar loyvum. Her er atgongdin til fiskastovnarnar avmarkað til nøkur reiðarí/skip, sum vóru í vinnuni, tá ið skipanin bleiv innførd. Hesi reiðarí hava soleiðis fingið tillutað fiskiloyvir. Á hvørjum árið verður samlaða talið av fiskidøgum ásett, sum síðani verður býtt eftir einum føstum lutfallið til tey, ið hava fiskiloyvi.

Tá ið eitt fiskiloyvi verður selt — við ella uttan skip — verður tí tann væntaða tilfeingisrentan í alla framtíð (ella so leingi loyvið er galdandi) avgerðandi fyri prísin á loyvinum. Eru ongi útlit til nakað meirvirðið, vil prísurin á loyvunum verða null, annars vil hann vera positivur. Í dag verða fiskiloyvir til partrolarar á landleiðini handlað fyri milliónaupphæddir — tað valda sostatt bjørt útlit fyri hesa vinnu.

Um fiskidagaskipanin verður varðveidd sum hon er — við ella uttan brúksskyldu — í nøkur ár afturat, og øll fiskiloyvini hava skift eigara, soleiðis at eitt nýtt ættarlið av loyvishavarum rindar tí fyrsta gylta ættarliðnum tilfeingisrentuna út í reiðum peningi, so sita vit eftir við eini skuldartyngdari fiskivinnu eins og í Íslandi. (Í Íslandi hava myndugleikarnir eisini innført eina skipan við langtíðar loyvum, har er tað tó við kvotum uppá nøgdina.)

Skipanin av fiskivinnuni kundi verið gjørd øðrvísi og betri enn í dag. Búskaparráðið hevur gjørt sær tann ómak at koma við einum ítøkiligum uppleggið til, hvussu hetta kann gerast. Sum teir sjálvir skriva, so er uppleggið óiva ikki uttan lýt, men tað er eitt gott útgangsstøði. Tað er tí ein ógvuliga ósaklig og átaluverd viðgerð at krevja formannin í Búskaparráðnum frákoyrdan fyri hetta upplegg. Sum ein skilamaður segði, kann tað bert samanberast við 'berufsverbot' í Týsklandi í 1930'unum.

**Íslendsk kanning er búskaparfrøðiligt sjusk**

Í áðurnevndu grein verður eisini víst til ein íslendskan professara í búskaparfrøði, sum skal hava víst, at samfelagsliga rokningin av at innføra skipanina hjá Búskaparráðnum verður stór. Hesin professari eitur Ragnar Árnason, og hevur hann í januar í ár almannakunngjørt eina frágreiðing um álegging av avgjaldið á íslendsku fiskivinnuna. Frágreiðingin bleiv eisini einsíðugt umrødd í Útvarpi Føroya í farnu viku, og vil eg tí her nýta høvið til at vísa á, at tað eisini í Íslandi eru tvær síður av orðaskiftinum.

Frágreiðingin var fíggja av tí íslendska reiðarafelagnum. Hon hevur fingið ein lemjandi kritikk í íslendsku fjølmiðlunum frá fleiri íslendskum búskaparfrøðingum frá m.a. íslendska tjóðbankanum og íslendska fróðskaparsetrinum. Eg havi sjálvur lisið frágreiðingina, og kann eg bert taka undir við kritikkinum, tí tær búskaparligu fortreytirnar fyri niðurstøðunum eru fullkomiliga skeivar. Eitt nú verður støði tikið í einum myndli av einum 'afturlatnum' búskapi, t.e. einum búskapi sum ikki verður ávirkaður av gongdini í altjóða búskapinum. Tað er púra greitt, at í einum slíkum myndli vil eitt avgjald á fiskivinnuna hava eitt heilt annað árin enn í einum opnum búskapi sum tí íslendska ella tí føroyska.

# Kommunurnar í Norðstreymi bróta slóð fyri eldrarøkt og vinnuframa

Fundarfólkið og vit fýra, sum á uppstillingarfundinum hjá Norðstreymoyar Javnaðarfelag vóru kosin til valevni floksins til løgtingsvalið, fegnast um at kommunurnar í okkara øki ganga undan í átroðkandi tiltøkum fyri teimum gomlu og í tiltøkum fyri at styrkja vinnuliga grundarlagið í økinum.

**Slóðbrótandi døgnrøktarskipan í Vestmanna**

Í Norðstreymi verður nú farið undir slóðbrótandi virksemi til frama fyri eldrarøktina í kommununi. Vestmanna Kommuna tekur hetta stigið, tí landsstýrið, sum eigur ábyrgdina á økinum, ger onki

Í valskrá okkara vísir Javnaðarflokkurin á, hvussu neyðugt tað er at vit beinanvegin taka stig til at útbyggja heimarøktina við eini døgnrøkt við tilkalliskipan. Tí vit kunnu ikki longur lata tað vera so, at fleiri og fleiri eldri liggja einsamøll og óhjálpin heima, tá heimahjálpin fer eftir seinastu dagligu vitjanina. Ein døgnrøkt við tilkalliskipan vil tí økja um tryggleikan og møguleikan at verða verandi í egnum heimi undir forsvarligum umstøðum. Hóast øll ásanna, at hetta er neyðugt stig at taka, so hava landsins myndugleikar – sum hava fullu ábyrgdina av heimarøktini - onki gjørt við tað.

Tí fegnast vit um, at nú verður farið undir slíka døgnrøktarskipan í Vestmanna kommunu. Bygdarráðið hevur leingi troðkað á, fyri at fáa bøtt um viðurskiftini hjá teimum gomlu, sum hava tørv á røkt út um tað, sum heimahjálpin kann veita. Ellis- og røktarheim er jú onki har í økinum (ætlanin um heimið í Sundalagnum fevnir ikki um Vestmanna og Kvívíkar kommunur), og eldrasambýlið kann als ikki klára røktartørvin – og er heldur ikki ætlað til tess. Vestmanna Kommuna hevur tikið stig til – og sett ávísa upphædd av - at seta eina døgnrøkt á stovn í samstarvi við Heimarøktina, fyribils sum ein royndarskipan í eitt ár. Tað eru jú nógvir praktiskar uppgávur at loysa í smb. við slíka tilkalliskipan, og vit hava jú ongar royndir frammanundan av slíkum virksemi. Tørvin kennir man heldur ikki, ella hvussu nýtslan fer at verða.

So tað er ongin ivi um, at hetta slóðbrótandi tiltakið hjá Vestmanna kommunu fer at verða til gleði og gagns hjá teim eldru, fyrst í kommununi sjálvari og síðani aðrastaðni við í landinum. Javnaðarflokkurin fer at gera alt fyri at ein slík skipan kann setast á stovn um alt landið.

**Ellis- og røktarheim í Norðstreymi**

Ferð eftir ferð er staðfest, at tað er ein ovurstórur átroðkandi tørvur á ellis- og røktarheimsplássum. Ferð eftir ferð er ávíst, hvussu ómetaliga stórar trupulleikar hetta skapar fyri tey gomlu og fyri teirra avvarandi og fyri almanna- og heilsuverkið. Hóast hesin bráfeingistørvurin á ellis- og røktarheimsplássum er gjørdur upp til eini 160 nýggj pláss, so er ikki eitt einasta pláss bygt tey seinastu 4 árini, henda samgongan hevur rátt fyri borgum. Tí fegnast vit um, at nakrar av kommununum í Norðstreymi hava tikið sær um reiggj og eru gingnar saman við øðrum kommunum í Sundalagnum um at loysa hesa stóru uppgávu. Tær hava í áravís arbeitt við málinum og strongt á, m.a. við at átaka sær alla fyrireikingina og tann stóra partin av fíggingini.

Nú er so klárt at fara undir at byggja nýggja ellis- og røktarheimið í Streymnesi. Takkað verið stríðið teirra er nú eisini skapt eitt nýtt fíggingarmynstur fyri bygging av ellis- og røktarheimum, soleiðis at eisini aðrastaðni í landinum kunnu kommunur nú fara undir líknandi tiltøk sum hjá hesum undangongu kommunum í Norðstreymi. Javnaðarflokkurin vil gera sítt fyri at veita kommununum trygd fyri, at landskassans partur av íløgum og rakstri skal verða játtaður.

**Vit stuðla Kvívíkar og Vestmanna kommunum viðv. vinnulívsfelagnum**

Í 1999 stovnaðu feløg og einstaklingar Vestmanna Vinnulívsfelag, við tí fyri eiga at styrkja vinnuliga grundarlagið í økinum, við at styrkja fortreytirnar fyri øktum og nýggjum vinnuligum virksemi. Kvívíkar og Vestmanna kommunur gjørdust eisini limir í hesum felag, við ávísum limagjaldið (150 kr. fyri hvørt fólkið í kommununi). Til tess at fremja endamál sítt hevur Vinnulívsfelagið síðani stovnað eitt fíggingarfelag. Kommunurnar hava tó als onga ávirkan á hetta felag og onki umboð í nevndini.

Nú krevur Føroya Landsstýri, at Kvívíkar og Vestmanna kommunur taka seg úr Vinnulívsfelagnum, vísandi til §50 í nýggju kommunustýrislógini, sum setir avmarkingar fyri luttøku hjá kommununum í vinnuligum virksemi. Táið Kvívíkar og Vestmanna kommunur vísa kravboðunum frá landsstýrinum aftur, tekur Javnaðarflokkurin fult undir við kommununum. Vit halda ikki at landsstýrið hevur heimild í lógini til at skerja kommunala virkisfrælsið á henda hátt. Og vit halda at landsstýrið fremur grovan mismun millum kommunur, táið hesar kommunur í Norðstreymi fáa forboð móti at vera limir í einum vinnulívsfelag, meðan fleiri aðrar kommunur veita vinnuligum fyritøkum beinleiðis stuðul, m.a. við íløgum í virkisbygningar, frystigoymslur, pakkhús og nógv annað, sum síðani verður latið fyritøkunum fyri lítið og lætt.

Javnaðarflokkurin heldur, at virkisrætturin hjá kommununum er ein av avgerandi fortreytunum fyri tí sosiala trivnaðinum og vinnuligu menningini í bygdunum um alt landið. Vit mótmæla tí at landsstýrið roynir at skerja og køva virkisrættin hjá Kvívíkar og Vestmanna kommunum á henda hátt, og vit stuðla kommununum í mótstøðu teirra móti órættvísu harraboðunum frá landsstýrinum. Skuldi tað verið neyðugt við broytingum í sjálvari kommunulógini hesum viðvíkjandi, so er Javnaðarflokkurin eisini sinnaður fyri taka tað stigið.

*Á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna,*
*tann 24. febr. 2002*

**Fundarluttakararnir og valevnini:**

**Soffi Egholm,**
**Gunnvá Mortensen,**
**Hans Jákup Simonsen og**
**Hans Pauli Strøm**



VIÐMERKINGAR

# Fólkaflokkurin – tann "gongda" sjálvstýrisleiðin?

Áki Andreasen

Fólkaflokkurin situr í samgongu, einari samgongu, sum fyri skjótt fýra árum hefti tað virðiliga vørumerki á seg "at vinna Føroyum fullveldið".

Hetta fyribrygdið, sum er hitt dýramatasta fyri øll sjálvstøðug lond, hetta fyribrigdið, sum skapar virðing úti í heimi — hetta fyribrigdið, sum ristir allan iva av sær, sum vit føroyingar kenna so væl frá tí "ríkisfelagsskapi", sum sambandsflokkarnir hava sum einastu vón fyri nakrari framtíð í Føroyum, hetta var tað, sum nú skuldi farast í holt við.

Vit, sum halda at einar frælsar Føroyar eru tað einasta rætta, vit riðu á einum aldutoppi og livdu mitt í verðini, tá samgongan kunngjørdi fyri føroya fólki, hvat var hennara fremsta endamál.

Men eitt sum eg mangan havi hugsað um síðan er, at eg m. a. tosaði við nógv eldri fólk, sum minnast tað politisku søguna, og felags fyri hesi var, at niðurstøðan var tann sama: við Fólkaflokkinum slapst ikki langt, tí tá á stóð glapp hann undan; "nei, nei" segi eg "tað er ein farin tíð, tá flokkar kúvenda, og so var tað sjálvandi fólkaatkvøðan — nei nú er tað álvara!"

**Gjørdar avtalur**

Tíðin gekk, samráðingar, sum endaðu í einari fullkomnari niðurgerð av okkum føroyingum, gjørdist gerandiskostur, har ein donsk stjórn skeyt okkara tjóðarrættindi í senk við lóðri frá føroysku sambandsflokkunum — og tá stóð á!!!

So kom veljarakanningin, sum skrikti fulveldisteppið undan Fólkaflokkinum, og sambandsmennirnir í "hinum føroyska Fólkaflokkinum" sluppu framat — og hava verið har síðan, teir Breckmann, Djurholm og Niclasen — og tá glapp!!!

**Løgmaður — ein vakthundur!**

Síðan kom ein neyðsemja og fylgjandi eitt uppskot um sjálvstýri Føroya fólks; tað var betur enn reindyrkað samband sjálvandi; men afturímóti upprunaliga fullveldisuppskotinum kann ikki sigast annað enn, at broddurin bleiv tikin av, og fullveldisdagurin útskotin meir enn gott er.

Orsøkin var einføld: "Hin Føroyski Fólkaflokkurin", kundi ikki halda seg til gjørdar avtalur, rembingarnar innanfloks blivur ov stórar, sambandskreftirnar gjørdu seg galdandi, tí teir høvdu sjálvandi ongantíð roknað við at nøkur fólkaatkvøða skuldi haldast, og tá tað so kortini sá út til at gerast veruleiki, vóru góð ráð dýr - so dýr, at Fólkaflokkurin valdi at blaka ein týðandi part av sínari stevnuskrá á sjógv, og síðan hava undanførslurnar verið eins nógvar sum tingmannatalið hjá flokkinum.

Føroya Løgmaður hevur hevur so verið nýttur sum vakthundur hjá sínum egna flokki, og við løgmansembætinum hevur hann vart Fólkaflokkin, og annras deilt ávaringar út til høgru og vinstru, tá víst hevur verið til upprunaligar avtalur.

Tað besta er, at fólkafloksfólk kappast um at rópa seg fadrar at núverandi sjálvstýristilgongd, hóast hon bæði er orðða og løgd fram av formanni Tjóðveldisfloksins!

**Hvat er sjálvstýrisleiðin hjá Fólkaflokkinum?**

Nú løgtingsvalið av álvara stundar til kemur týðuligari og týðuligari til sjóndar, at Fólkaflokkurin hevur ein álvarsligan trupulleika. Hesin hevur einki við Tjóðveldisflokkin at gera, sum annars hevur fingið ábygdina av tí, sum ikki gekk, løgmaður kann ikki ávara móti hesum trupulleika — tað kundi hann sjálvandi, men so var hann helst ikki fólkafloksmaður longur, her kann ikki tosast um samgongustev, tí hesin trupulleikin veksur innan úr Fólkaflokkinum. Síðsta dømi er eitt útspæl um eitt "samveldisuppskot", hvat tað so er; men trupulleikin er í veruleikanum einfaldur: Fólkaflokkurin, sum hevur einar sjálvstøðugar Føroyar við í sínari stevnuskrá, hevur framstandandi limir bæði á Løgtingi og landstýri, sum eru svornir sambandsmenn, teir ynskja ikki fullveldi, teir prýða seg við nøkrum "kráku yvirtøkum", men tá veruligu tøkini skulu takast, tá frælsi skal vinnast, tá á stendur, tá gelppur "Hin Føroyski Fólkaflokkurin" á grát mítt elskaða land.

# Barnsburðafarloyvið og barnaansing úr hond í hond skapar tryggleika

Annita á Fríðriksmørk



At sleppa at verða heima hjá foreldrunum alt tað fyrsta árið, er eitt krav, sum børn okkara eiga at fáa rætt til.

At lata annað av foreldrunum verða heima hjá barninum alt tað fyrsta árið við løn, er eitt krav, sum børn okkara eiga at hava rætt til.

At lata barnið verað heima hjá mammuni og/ella pápanum alt tað fyrsta árið til barninum stendur í boði tilboð um skipaða barnaansing eigur at verða ein ómissandi rættur hjá øllum børnum okkara.

Tí eiga vit at skipa so fyri:

at barnsburðarfarloyvið verður longt úr 6 mánaðum upp í eitt ár,
at tá tað fyrsta árið er liðið hava børnini krav uppá skipaða barnaansing.

Arbeiðsmarknaðurin hevur verið fyri eini galoperaðari menning seinastu 30 árini. Men fløskuhálsanir hava alla tíðina fylgt við. Fløskuhálsar sum eitt nú: barnsburðarfarloyvi, barnagarðar, frítíðarskúlar, eldrarøkt osfr. Ì høvuðsheitum viðurskifti har kvinnan hevur sitið við ábyrgd.

Ein eyðsýndur fløskuhálsur er, at vit óbeinleiðis hava noytt bæði foreldrini út á arbeiðsmarknaðin, áðrenn skipað farloyvi og barnaansing er fingin til vega.

**so leingi tey bleytu virðini ikki eru fingin í skipaða legu, er arbeiðsmarknaðurin framvegis í djúpum byrjunartrupulleikum**

Samstundis, sum kvinnan hevur sitið við hesi ábyrgd, krevja bæði arbeiðsmarknaður og samfelagsviðurskiftini annars, at kvinnan er úti á arbeiðsmarknaðinum. Men so leingi tey bleytu virðini ikki eru fingin í skipaða legu, er arbeiðsmarknaðurin framvegis í djúpum byrjunartrupulleikum. Tí børn okkara og tey gomlu eiga at hava mennandi og virðilig kor at liva í, og tað hava tey ikki so leingi samfelagið ikki raðfestir hesi økini.

Barna- og eldraár eru ár, sum telja umleið helvtina av einum mannalívið. Ti eiga vit at ansa eftir, at tað ikki bara er arbeiðsmarknaðartíðin, sum hevur týdning, men eisini árini frammanundan og aftaná.

**framhaldandi búskaparvøkstur er treytaður av barnaansing /barnsburðarfarloyvið, bústaðarmøguleikum og eldrarøkt.**

Onki samfelag er sterkari enn tað veikasta liði. Og soleiðis er eisini her heima. Okkara samfelag hevur verið fyri stórum búskaparvøkstri seinastu 4 árini, og tað einasta, sum kann steðga framhaldandi búskaparvøkstri er vantandi barnaansing/barnsburðarfarloyvið, vantandi bústaðartrupulleikar og vantandi eldrarøkt. Tí eru tað hesi viðurskifti, sum komandi samgonga eigur at leggja størstan dentin á.

Sitandi samgonga hevur lagt størstan dent á at ment almanna- og heilsuøki og mentunar- og skúlaøki, umframt at hendan samgonga fyri fyrstu ferð í uppgangstíðum hevur lagt dent á týdningin at leggja til síðis og halda aftur í góðum tíðum. Tí er raðfestingarpolitikkurin hjá hesi samgongu fyrimyndarligur. Ikki fyrr enn nú eru lunnar lagdir undir at menna ein tryggan búskap. Og treytin fyri at barnsburðarfarloyvi, barnaansing og eldrarøkt verða raðfest og koma í eina trygga legu, er at búskapurin er støðugur og sjálvberandi. Tað nyttar onki at hava ein búskap, sum gjarar út í góðum tíðum og hálar inn í ringum tíðum. Tá verða tað altíð tey bleytu virðini, sum eru við skerdan lut í ringum tíðum.

Tí eigur raðfestingin hjá eini komandi samgongu, sum byggir á herðarnar á sitandi samgongu, at halda fram við at menna tey bleytu virðini, soleiðis at barnsburðarfarloyvi verður longt úr 1/2 árið til eitt ár, at skipað barnaansing er eitt krav frá tí barnið er eitt ár, at eldrarøktin verður ment og at bústaðarpolitikkur verður settur í kortið.

Slíkt vildi tikið burtur teir størstu fløskuhálsarnar í okkara samfelagið í dag.

# Føroyskur skúli og føroysk kirkja

**Jógvan Arge**
*Valevni tjóðveldisfloksins til løgtingsvali*



Tað er øvut, at alt ræðið á Føroya Kirkju liggur suðuri í Keypmannahavn, og at fjarskotnir danskarar rinda prestunum í Føroyum løn fyri at boða føroyingum í Føroyum Guðs orð.

Skúlin og kirkjan hava allar dagar verið hornasteinar í føroyskum tjóðskaparstríði.

Frá fyrsta degi hava tey, sum hava stríðst fyri at varðveita og menna okkara tjóðskaparligu eyðkenni, lagt dent á, at skúlin og kirkjan gjørdust føroysk, og at hesir báðir týðandi samfelagsstovnar komu á føroyskar hendur.

Tøkini eru tikin við mikið stríð og strev. Fyrsta stóra takið var, at føroyskt mál fekk innivist í kirkjuni og í skúlanum. Um hesar spurningar var stundum eitt eljustríð, sum kostaði teimum, sum undan gingu, bæði størv og umdømi.

Føroyskir sálmar, føroyskar bíbliutekstir, føroyskar prædikur, føroyskir sangir, føroyskar bókmentir og føroyskar skúlabøkur, sum menn og kvinnur fóru undir av sínum eintingum, stuðlaðu upp undir gongdina.

**Tógvið stríð**

Framstigini eru gjørd so líðandi. Eitt nú dittaði Føroya Landsstýri sær fyri fjórðingsøld síðani til at taka umsitingina av skúlanum í Føroyum upp á seg. Tað var eitt ódnartak, tí føroyingar høvdu onki havt við hetta at gera frammanundan.

Nú á nýggjárinum vóru vit komin so langt fram á leið, at føroyskir myndugleikar eftir løgtingssamtyktini um sjálvstýri Føroya fólks eisini tóku upp á seg at gjalda skúlan, sum vit nú ráða einsamøll fyri.

At hetta hevur verið eitt tógvið stríð sæst kanska einabest av, at skúlin er ikki vorðin føroyskur fyrrenn næstan 115 ár eftir, at Jóannes bóndi yrkti sín tiltikna stríðsljóm "Nú er tann stundin komin til handa/ á hesum landi/ at vit skulu taka lógvatak saman/máli til frama/.

Tað er enn sum áður púra nattúrligt, at eitt land hevur alt ræðið á sínum skúlaskapi og rindar fyri at útbúgva síni børn og sín ungdóm.

Men við hesum er verkið ikki lokið. At stjórna skúlanum setir krøv til skúlaverkið og tey, sum har starvast. Tað setir eisini krøv til politiska valdið at stinga út í kortið, hvussu skúlin best tænir tí føroyska samfelagnum. Tað er setningurin nú.

**Eiga at gjalda kirkjuna sjálvi**

Kirkjan er ikki føroysk enn, men landsstýrið er farið undir samráðingar við danskar myndugleikar um at fáa hana á føroyskar hendur.

Eitt og hvørt samfelag við virðing fyri sær sjálvum eigur at seta sín dám á málsøki sum hetta, og í Føroyum hava summar samkomur lagt dentin júst her.

Tað er øvut, at alt ræðið á Føroya Kirkju liggur suðuri í Keypmannahavn, og at fjarskotnir danskarar rinda prestunum í Føroyum løn fyri at boða føroyingum í Føroyum Guðs orð.

Tað er okkara egna sak at bera so í bandi, at Guðs orð verður boðað í okkara egna landi.

Nú er tann stundin skjótt komin til handa.